# Public service-sáttmáli

millum

## Kringvarp Føroya og Mentamálaráðið

tíðarskeiðið

1. januar 2017 til 31. desember 2020

Avrit frá kvf.fo

## Innihaldsyvirlit


**1 . INNGANGUR** ........ 3

**2 . LÓGARÁSETTAR PUBLIC SERVICE-SKYLDUR** ........ 5

**4. ENDAMÁLIÐ VIÐ PUBLIC SERVICE** ........ 6

*4.1 Styrkja áhuga borgarans at virka í einum fólkaræðisligum samfelag* ........ 6
*4.2 Menna føroyska málið og samleika føroyinga* ........ 7
*4.3 Stimbra mentan og skapanarevni* ........ 7
*4.4 Stimbra vitan og fatan* ........ 7

**5.1 ALMENNAR RAÐFESTINGAR, IÐ ERU GALDANDI FYRI ALLAR SENDINGAR** ........ 7

*5.1.1 Samskifti við borgaran* ........ 7
*5.1.2 Føroyskt mál í Kringvarpi Føroya* ........ 8
*5.1.3 Útlendskt tilfar* ........ 8
*5.1.4 Alnetstænastur* ........ 8
*5.1.5 At keypa framleiðslur* ........ 8
*5.1.6 Tilbúgving* ........ 9
*5.1.7 Førleikamenning og dygd* ........ 9

**5.2 RAÐFESTINGAR INNAN ÁVÍSAR BÓLKAR AV SENDINGUM** ........ 9

*5.2.1 Tíðindi og aktuelt* ........ 9
*5.2.2 Tilfar úr øllum Føroyum* ........ 9
*5.2.3 Onnur lond* ........ 9
*5.2.4 Mentan* ........ 9
5.2.4.1 *List* ........ 10
5.2.4.2 *Drama* ........ 10
5.2.4.3 *Bókmentir* ........ 10
5.2.4.4 *Undirhald* ........ 10
*5.2.5 Átrúnaður* ........ 10
*5.2.6 Ítróttur* ........ 10
*5.2.7 Børn og ung* ........ 10
*5.2.8 Tónleikur* ........ 11
*5.2.9 Tilfar til undirvísing* ........ 11
*5.2.10 Tænastur til fólk, ið bera brek* ........ 11
*5.2.11 Tilflytarar / integratión* ........ 11

**6. MIÐLASAVNIÐ** ........ 12


Avrit frá kvf.fo

## 1. Inngangur

Fyrsta tíðarskeiðið við einum skipaðum public service-sáttmála millum Kringvarp Føroya og Mentamálaráðið var galdandi fyri árini 2011-2013. Síðan tá hevur eingin undirskrivaður sáttmáli verið, men sigast má, at samanumtikið er breið semja millum partarnar um at raðfesta yvirskipaðu public service-skyldurnar, ið sáttmálin miðar ímóti. Partarnir leggja dent á, at Kringvarp Føroya hevur ábyrgdina av skránni og frælsi til at leggja innihaldið til rættis.

Kringvarp Føroya hevur sum sjálvstøðugur, almennur stovnur ávísar public service-skyldur mótvegis øllum borgarum. Kringvarp Føroya hevur ein týðandi leiklut at miðla og mynda føroyska mentan. Stovnurin hevur somuleiðis stóran týdning fyri fólkaræðið í landinum, tí hann í virksemi sínum varpar ljós á og elvir til kjak um samfelagsviðurskifti. Fyri at tryggja, at Kringvarp Føroya røkir raðfestar public service-skyldur, gera Mentamálaráðið og Kringvarp Føroya henda sáttmála.

Kringvarp Føroya skal framleiða og senda dygdargott tilfar og á henda hátt virka fyri, at allir borgarar gerast betur førir fyri at taka støðu til og ávirka samfelagsgongdina á ein fólkaræðisligan hátt. Hetta merkir, at stovnurin bindur seg til at tryggja eitt breitt útboð av sendingum og tænastum fyri alt Føroya fólk umvegis sjónvarp, útvarp, alnet og líknandi miðlar. Sendingarnar skulu m.a. fevna um sakligan og óheftan tíðindaflutning, upplýsing, mentan og undirhald, herundir eisini sendingar til børn og ung.

Somuleiðis skal Kringvarp Føroya sum gluggi virka fyri, at føroyska tjóðin gerst betur før fyri at skilja heimssamfelagið og liva í og saman við tí. Eisini skulu altjóða ásetingar um eitt nú rættindi hjá teimum, ið bera brek, hjá børnum og javnstøðuatlit í samfelagnum havast í huga í almenna kringvarpsvirkseminum.

Miðlalandslagið er nógv broytt, og miðlatilboðini eru øðrvísi í dag. Alt fleiri portalar lata tíðindi og áskoðanir til føroyingar, men eingin trygd er fyri óheftni. Portalar venda sær ofta til sín serliga málbólk og hava ikki somu skyldu at veita eina breiða tænastu. Tí er tað átrokandi neyðugt, at vit hava eina óhefta miðlaeind, ið byggir alt sítt virki á meginreglur um góðan fjølmiðlasið. Tað hevur eisini størri týdning enn nakrantíð, at Kringvarp Føroya er ein savnandi miðil, sum virkar í fólksins tænastu og røkir neyðugar public service-skyldur.

Public service-hugtakið er ovurhonds breitt, og tí er í lógini um Kringvarp Føroya heimilað landsstýrismanninum, eftir orðaskifti í Løgtinginum, at undirskriva ein tíðaravmarkaðan public service-sáttmála við Kringvarp Føroya um at raðfesta og tryggja ávísar nærri allýstar public service-skyldur.

Við broytingini í kringvarpsgjaldinum, sum kom í gildi í januar 2016, har kringvarpsgjaldið verður kravt inn um skattin, hevur Kringvarp Føroya fingið eitt støðugari og tryggari fíggjarligt grundarlag.

Orsakað av at fyrsta tíðarskeiðið var eitt tríáraskeið og eisini orsakað av, at hetta er fyrstu ferð, at sáttmáli av hesum slag hevur verið galdandi, og at hann tí kanska ikki hevur staðið sína roynd í øllum lutum, hava partarnir gjørt av, nú støða skuldi takast til nýggjan sáttmála, ikki at broyta so nógv í innihaldinum, men heldur at royna at fáa sáttmálan royndan út í æsir.

Avrit frá kvf.fo

Partarnir vóna, at sáttmálin, ið fevnir um tíðarskeiðið 1. januar 2017 – 31. desember 2020, kann virka fyri, at Kringvarp Føroya fær eitt gott grundarlag til tess at røkja sínar public service-skyldur og fyri at virka í fólksins tænastu.

Tórshavn, 22. desember 2016

| | |
|---|---|
| *stýrisformaður* | *landsstýrismaður* |
| *stjóri í Kringvarpi Føroya* | *deildarstjóri* |

Avrit frá kvf.fo

## 2. Lógarásettar public service-skyldur

Tær skyldur, sum Kringvarp Føroya hevur, eru yvirskipað ásettar í § 10 í kringvarpslógini. Skyldurnar eru breitt útgreinaðar, stovnurin skal leggja dent á eitt sakligt og óheft upplýsingarvirksemi og eitt fjøltáttað programmtilboð:

> Kringvarp Føroya hevur skyldu til at útvarpa sendingar, ið fevna um tíðindi, upplýsing, mentan og undirhald. Kringvarp Føroya skal í programmvirkseminum leggja dent á upplýsingar- og talufrælsi, sakliga og óhefta upplýsing og eitt fjøltáttað tilboð, sum varðveitir og fjálgar um mál, mentan, átrúnað og siðalæru føroyinga.
>
> *Stk. 2.* Kringvarp Føroya eigur at leggja dent á at hava gott føroyskt mál í sínum sendingum. Kringvarp Føroya hevur skyldu at tryggja starvsfólkunum holla málsliga ráðgeving.
>
> *Stk. 3.* Kringvarp Føroya skal ansa eftir, at sendingar ikki kunnu skaða likamligu, sálarligu og siðalagsligu menningina hjá børnum og ungum undir lógaldri, eitt nú við ónærisligum ella ógrundaðum harðligum innihaldi.
>
> *Stk. 4.* Sendingarnar skulu ikki á nakran hátt elva til mannminkan, harðskap ella hatur orsakað av húðaliti, kyni, átrúnaði ella tjóðskapi.
>
> *Stk. 5.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at í sendivirkseminum skal serligt fyrilit vísast børnum og ungum.
>
> *Stk. 6.* Virksemið hjá Kringvarpi Føroya kann eisini fevna um at endurvarpa útlendskar public service-sjónvarpsrásir.

Sambært § 5 hevur stjórin ábyrgdina av dagliga programmvirkseminum, og stýrið hevur ábyrgdina av, at yvirskipaðu meginreglurnar fyri programmpolitikkinum verða hildnar (public service-eftirlit).

## 3. Sáttmálaásettar public service-skyldur

Sambært § 11 er heimilað landsstýrismanninum at undirskriva ein public service-sáttmála við Kringvarp Føroya eftir orðaskifti í Løgtinginum um ætlaða innihaldið. Sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið er ikki ætlanin, at landsstýrismaðurin og Løgtingið skulu leggja seg út í programmábyrgdina hjá stjóranum ella redaksjonella frælsið hjá Kringvarpi Føroya.

Í viðmerkingunum verður víst á, at public service-hugtakið er so breitt, at tað er trupult at røkja allar hugsandi skyldur í senn. Tí verður mett skilagott, at landsstýrismaðurin, sum umboð fyri Løgtingið og fólkið, kann raðfesta og tryggja ávísar nærri allýstar public service-skyldur í einum tíðaravmarkaðum sáttmála. Sum dømi verða nevnd ávís mentanarøki, føroyskt mál, sendingar fyri børn og ung, og at sendingar til ávísan aldursbólk skulu verða týddar til føroyskt. Eisini kunnu mál, tíðarkarmar og vav á eginframleiðslu til sjónvarp verða ásett í sáttmálanum.

Avrit frá kvf.fo

## 4. Endamálið við public service

Endamálið við public service-sáttmálanum er at lýsa, hvørjar uppgávur Kringvarp Føroya skal loysa og at lýsa teir karmar, sum public service-virksemið skal virka í.

Tað er av størsta týdningi, at stovnurin megnar at røkja tær uppgávur, ið eru tilskilaðar í sáttmálanum, og hevur fyrilit fyri fólkaræðisligum, samfelagsligum og mentanarligum viðurskiftum, sum viðkoma øllum føroyingum.

Sum ovasta leiðsla fyri Kringvarpi Føroya hevur stýrið ábyrgdina av at hava eftirlit við, at skráin verður løgd til rættis sambært endamálunum, sum eru orðað í kringvarpslógini og public service-sáttmálanum.

Kringvarp Føroya skal í størstan mun tryggja, at tilfarið:

- er dygdargott
- er óheft av seráhugamálum
- er fjølbroytt og margfalt
- er viðkomandi, álítandi og sakligt, tá talan er um tíðindi og upplýsing annars
- veitir borgaranum atgongd til týðandi upplýsingar og orðaskifti um avgerandi samfelagsviðurskifti
- vendir sær til nógvar avmarkaðar áhugabólkar og til ein størri skara
- gevur borgaranum gott innlit
- er tøkt hjá øllum borgarum í sjónvarpi, útvarpi og alneti.

Kringvarp Føroya skal í sendingum og tænastum:

**4.1** Styrkja áhuga borgarans at virka í einum fólkaræðisligum samfelag

Kringvarp Føroya skal tryggja atgongd til týðandi samfelagskunning og kjak.

Kringvarp Føroya skal geva eina haldgóða mynd av nútíðarsamfelagnum og gjøgnum sendingar og tænastur stimbra Føroya fólk í at luttaka í almenna kjakinum. Kringvarp Føroya tryggjar og gevur møguleikar fyri samrøðum og sambondum millum ymiskar bólkar og áskoðanir í samfelagnum.

Kringvarp Føroya skal hava ein virknan leiklut í at tryggja, at nýggju talgildu miðlarnir verða gjørdir atgeingiligir hjá almenninginum. Nýggjar sendingar og kunningartænastur skulu venja borgaran við nýggju tøknina og geva íblástur til at brúka hana.

Tænastan skal taka støði í samfelagnum og skal endurspegla margfeldi, mentan, ymiskar lívsáskoðanir og livihættir.

Kringvarp Føroya skal sum public service-miðil tryggja ein tíðindaflutning, ið er óheftur av politiskum og handilsligum áhugamálum og áhugabólkum annars.

Avrit frá kvf.fo

Sum liður í at styrkja public service-skyldur er ein avgerandi fortreyt, at borgarin hevur álit á Kringvarpi Føroya. Álit í public service-miðlahøpi er, at alt tilfar, sum verður latið úr hondum er viðgjørt eftir sakligum og fakligum leiðreglum.

**4.2** Menna føroyska málið og samleika føroyinga

Málið er týdningarmikil samfelags- og mentanarberi og er grundarlagið undir samleikanum hjá fólkinum. Móðurmálið skal tí røkjast og styrkjast í almenna kringvarpsmiðlinum. Samleikin kann styrkjast, um Kringvarp Føroya megnar at spegla føroyska samfelagið, t.e. viðgera søgur og tilburðir úr øllum Føroyum. Annaðhvørt við at vera í økjunum, har føroyingar eru, ella við at ferðast javnan til økini, har søgurnar spretta.

**4.3** Stimbra mentan og skapanarevni

Kringvarp Føroya skal leggja dent á at vera í fremstu røð at miðla mentan, list og mentanararv.

Kringvarp Føroya skal ríka føroyskt mentanarlív við at gera sendingar, ið eru nýskapandi, avbjóðandi og elva til kjak.

Public service skal skiljast so, at Kringvarp Føroya skal vera í "fólksins tænastu". Umframt avbjóðandi sendingar kann Kringvarpið eisini uttan at skaka óheftnið framleiða tilfar í samstarvi við áhugafeløg. Tað er við til at byggja upp og røkja tað álit og viðurkenning, sum sømir seg einum almennum public service-stovni.

**4.4** Stimbra vitan og fatan

Kringvarp Føroya skal stimbra áhuga føroyinga at ogna sær breiða almenna vitan gjøgnum atkomuligt og fólksligt tilfar.

Kringvarp Føroya skal eisini stimbra áhugan fyri okkara alsamt meira altjóðagjørdu verð og soleiðis virka fyri at skapa størri fatan og størri tolsemi mótvegis øðrum mentanum og áskoðanum. Kringvarp Føroya skal tí eisini miðla og viðgera mentan, søgu- og samfelagsviðurskifti úr ymsum londum.

## 5. Public service-skyldur

Sáttmálapartarnir eru samdir um, at Kringvarp Føroya í sáttmálaskeiðnum skal miða ímóti at raðfesta og tryggja, at ávísar nærri lýstar public service-uppgávur verða loystar. Talan er bæði um almennar raðfestingar og raðfestingar innan verandi sendingar.

### 5.1 Almennar raðfestingar, ið eru galdandi fyri allar sendingar

*5.1.1 Samskifti við borgaran*

Kringvarp Føroya eigur at skipa fyri upplýsing um public service og fólkaræði í breiðum týdningi.

Kringvarp Føroya virkar í fólksins tænastu, og tí skal Kringvarp Føroya virka fyri støðugum samskifti við borgaran um alt landið.

Avrit frá kvf.fo

Kringvarp Føroya skal tryggja, at orðaskifti verður við jøvnum millumbilum um public service, innihald, endamál og miðlapolitikk. Talan kann verða um fund, ráðstevnu og almennar frágreiðingar um einstøku partarnar av public service-arbeiðinum.

Góður møguleiki skal vera fyri samskifti um alnet og heimasíðu stovnsins. Borgaranum skal á sjónligum staði standa í boði at siga sína hugsan um tíðindaflutning og programmvirksemi í Kringvarpi Føroya.

Kringvarp Føroya eigur at svara og vera virkið í dialoginum. Sum almennur tíðindamiðil hevur tað stóran týdning, at stovnurin leggur dent á opinleika og gjøgnumskygni.

*5.1.2 Føroyskt mál í Kringvarpi Føroya*

Tað er lógarásett, at Kringvarpið eigur at leggja dent á at hava gott føroyskt mál í sínum sendingum og hevur skyldu at tryggja starvsfólkunum holla málsliga ráðgeving.

Kringvarpið skal orða eina greiða málstevnu, soleiðis at stovnurin kann lúka hesar lógarásetingar og skal knýta málsligan ráðgeva at Kringvarpi Føroya. Stovnurin skal regluliga hava sendingar um mál.

Stovnurin skal virka fyri at menna føroyska málið, soleiðis at borgarin upplivir rætt og lætt skilligt mál, ið er livandi í almenna rúminum. Aðalmálið er, at allar sendingar, ið Kringvarp Føroya framleiðir, eru á góðum føroyskum máli.

*5.1.3 Útlendskt tilfar*

Størsti parturin av tilfarinum í sjónvarpsskránni hjá Kringvarpinum er útlendskur, tí tað er kostnaðarmikið at framleiða føroyskar sendingar. Harumframt er tað kostnaðarmikið at teksta ella ljóðseta útlendska tilfarið við føroyskum máli. Barnasendingar verða týddar til føroyskt ella hava føroyska talu, og Kringvarp Føroya eigur at miða ímóti, at aðrar sendingar á útlendskum máli eisini verða tekstaðar ella ljóðsettar við føroyskari talu.

*5.1.4 Alnetstænastur*

Kringvarp Føroya skal gagnnýta alnetið til innihald og tænastur, ið samsvara við public service-skyldurnar. Heimasíðan hjá Kringvarpi Føroya skal kunna nýtast sum samskiftis- og tænastumiðil. Hon skal fevna um tíðindi og aktuelt, mentan, tilfar til børn og ung, undirvísing og annað viðkomandi. Heimasíðan røkkur sum miðil bæði borgarum í Føroyum og uttanlands.

Kringvarp Føroya skal senda sínar egnu sendingar beinleiðis á alnetinum. Allar egnar sendingar, tónleikasendingar undantiknar, skulu leggjast á alnetið.

Kringvarp Føroya samskipar talgilt føroyskt tilfar til børn, so at tað verður lætt atkomuligt hjá øllum.

*5.1.5 At keypa framleiðslur*

Hóast Kringvarpið hevur evstu ábyrgd av framleiðslunum, eigur Kringvarpið at hava eitt opið og skipað samstarv við framleiðslueindir uttan fyri stovnin, bæði feløg og einstaklingar. Stovnurin eigur í ávísan mun at bjóða framleiðslur út og keypa lidnar framleiðslur og konsept.

Fríyrkisfólk hava tá møguleika at bjóða seg fram og menna sín serkunnleika, og vit fáa størri sendifjølbroytni

Avrit frá kvf.fo

*5.1.6 Tilbúgving*

Sum ásett í kringvarpslógini, hevur Kringvarp Føroya skyldu til at taka lut í almennum tilbúgvingarskipanum. Hetta merkir, at Kringvarp Føroya skal varpa boð, ið hava týdning fyri tilbúgvingina til Føroya fólk. Greið mannagongd skal gerast saman við hinum pørtunum í tilbúgvingini, og ábyrgdin hjá Kringvarpi Føroya lýsast.

*5.1.7 Førleikamenning og dygd*

Kringvarp Føroya skal stremba eftir at skapa eitt mennandi og áhugavert arbeiðsumhvørvi, har faklig dygd og kritiskur journalistikkur hava fremstu raðfesting, og stovnurin skal vera tann fjølmiðil í Føroyum, ið hevur størst trúvirði. Kringvarp Føroya skal vera við til at menna føroyskan journalistikk t.d. í samstarvi við Fróðskaparsetur Føroya.

Kringvarp Føroya hevur í størst møguligan mun skyldu til at taka starvslesandi á øllum útbúgvingarstigum.

## 5.2 Raðfestingar innan ávísar bólkar av sendingum

*5.2.1 Tíðindi og aktuelt*

Tíðindaflutningurin í Kringvarpi Føroya skal vera óheftur av politisku skipanini og seráhugamálum annars og eigur at verða varpaður so sjálvstøðugt og fjølbroytt sum møguligt úr ymsum sjónarhornum í ymsu miðlunum, t.e. í sjónvarpsmiðlinum, í útvarpsmiðlinum og í alnetsmiðlinum.

Tíðindi í Kringvarpi Føroya skulu vera perspektiverandi, uppfylgjandi og greinandi.

Á deildini Aktuelt skulu í minsta lagi vera tvær tíðindaredaksjónir, sum hava hvør sín redaktør, ið hevur ábyrgd av tíðindadegnum og leiðir redaksjónina.
Tíðindaredaksjónirnar skulu virka so óheft av hvørjari aðrari, sum til ber.
Kringvarpið eigur at orða leiðreglur um, í hvønn mun tíðindaredaksjónirnar samstarva, hví og nær.

*5.2.2 Tilfar úr øllum Føroyum*

Kringvarp Føroya skal varpa ljós á og spegla vinnu- og mentanarlív og samfelagsviðurskifti kring alt landið.

*5.2.3 Onnur lond*

Kringvarp Føroya skal miðla og viðgera mentan, søgu- og samfelagsviðurskifti úr ymsum londum.

*5.2.4 Mentan*

Kringvarp Føroya skal gera sendingar, sum skjalprógva samtíð okkara, og sum kunnu standa sum varandi virði fyri eftirtíðina.

Í skránni skal Kringvarp Føroya endurspegla gerandisdagin og veruleikan hjá føroyingum í øllum sínum fjølbroytni, eitt nú innan átrúnað, livihátt, frítíð, arbeiðs- og familjulív.

Miðast skal ímóti at framleiða og varpa sendingar um serføroysk viðurskifti innan náttúru og mentan, eitt nú føroyskan dans, føroyskt handverk og føroyskt djóra- og plantulív.

Avrit frá kvf.fo

*5.2.4.1 List*

Kringvarp Føroya skal endurspegla og viðgera føroyska list í øllum sínum fjølbroytni og listagreinum.

*5.2.4.2 Drama*

Kringvarp Føroya skal virka fyri at menna og senda útvarps- og sjónvarpsdramatikk. Stovnurin skal eisini stuðla uppundir, at okkara skrivandi fólk verða eggjað til at skriva dramatikk til útvarp og sjónvarp. Kringvarp Føroya samstarvar við avvarðandi partar um framleiðslu av sjónvarpsdramatikki.

*5.2.4.3 Bókmentir*

Kringvarp Føroya skal miða ímóti at viðgera og skifta orð um ymiskar bókmentir og miðla bæði føroyskar og útlendskar bókmentir til borgaran. Kringvarp Føroya skal, har tað ber til, brúka yrkislærdar sjónleikarar sum upplesarar.

*5.2.4.4 Undirhald*

Ein týðandi táttur í virkseminum hjá Kringvarpi Føroya er at senda undirhald fyri alla familjuna. Tað eigur at fevna breitt um skemt og speisemi, frítíð og ítriv og kappingar. Kringvarp Føroya skal í sáttmálaskeiðinum leggja seg eftir at framleiða undirhaldssendingar, ið fanga og endurspegla heimliga speisemið og skemtingarlyndið. Í skemti ella speisemi, ið sprettur úr aktuellum ráki ella tí, ið fyriferst, ber eisini til at eggja og arga, flyta mørk og elva til kjak.

*5.2.5 Átrúnaður*

Kringvarp Føroya skal upplýsa, stimbra kjak og viðgerð av andaligum og átrúnaðarligum fyribrigdum, ið hava við tilveru okkara at gera. Varpað verður regluliga frá gudstænastum og møtum.

*5.2.6 Ítróttur*

Kringvarp Føroya skal leggja seg eftir at viðgera ítrótt úr forkunnugum sjónarhornum. Kringvarp Føroya skal við bæði beinleiðis og frammanundan framleiddum sendingum á fjølbroyttan hátt viðgera ymsu ítróttargreinirnar.

*5.2.7 Børn og ung*

Kringvarp Føroya skal leggja doyin á at hava gott tilfar til børn og ung. Hetta skal gerast við at miðla sendingar og nýggjar tænastur.

Kringvarp Føroya skal gera dygdargóðar sendingar til børn og ung. Í barnasendingunum skal Kringvarp Føroya lata ein part av innihaldinum vera úr føroyskum jørðildi, soleiðis at børnini kenna seg aftur í einum føroyskum veruleika. Kringvarp Føroya skal miða ímóti at geva børnunum møguleika at kenna tað, sum er heimligt, samstundis sum tey verða kunnað um tað, sum onnur seta høgt. Kringvarp Føroya skal venja børnini til at hugsa sjálvstøðugt og sjálv at meta um dygdir og ódygdir.

Størri dentur skal leggjast á gott tilfar til føroyskan ungdóm, sum eggjar ungdóminum at taka lut í samfelagsgongdini á fólkaræðisligan hátt. Somuleiðis skulu tey ungu menna seg til at kjakast um og taka støðu til viðurskifti, sum ávirka teirra gerandisdag. Ein partur av

Avrit frá kvf.fo

innihaldinum skal tí hava støði í gerandisdegnum hjá føroyskum ungdómi og í innihaldi, sum tey ungu kenna seg aftur í.

Kringvarp Føroya skal tryggja, at filmar, ið verða sýndir, eru flokkaðir samsvarandi lógini um miðlaráð til verju fyri børn og ung.

*5.2.8 Tónleikur*

Kringvarp Føroya skal sum mentanarstovnur miðla tónleik og skapa áhuga fyri føroyskum tónleiki.

Føroyskur tónleikur hevur eitt týðandi pláss í Kringvarpi Føroya.

Kringvarp Føroya skal geva rúmd fyri tónleiki innan allar tónleikagreinir. Kringvarp Føroya skal orða ein greiðan tónleikapolitikk, sum hevur fyrilit fyri býtinum millum føroyskan og útlendskan tónleik, ymsu tónleikagreinirnar, nýggjan og eldri tónleik o.s.fr.

Kringvarpið kann samstarva við aðrar mentanarstovnar og onnur við tí endamáli at skapa høvi hjá tónleikarum at framføra, og hjá føroyskum tónleikaverkum at verða framførd, serliga tá talan er um føroyskan sang og dans og føroysk kvæði, klassiskan tónleik, kórtónleik, populertónleik o.a.

*5.2.9 Tilfar til undirvísing*

Kringvarp Føroya skal senda og endurvarpa sendingar, sum mugu metast at hava varandi undirvísingar- og upplýsingarvirði, eitt nú sendingar um mál, list, søgu og mentan heima og heiman.

Kringvarp Føroya kann taka upp samstarv við viðkomandi undirvísingar- og mentanarstovnar í sambandi við innihald, framleiðslu og kunning um undirvísingartilfar.

*5.2.10 Tænastur til fólk, ið bera brek*

Kringvarp Føroya skal støðugt arbeiða fyri at tryggja fólki, ið bera brek at tey kunna gagnnýta miðlatænastur og tiltøk, sum Kringvarp Føroya skipar fyri. Public service-tænastur til deyv og hoyriveik skulu styrkjast.

Kringvarp Føroya skal í samstarvi við viðkomandi partar teknmálstulka tíðindi og sendingar, ið hava stóran samfelagsáhuga, beinanvegin. Kringvarp Føroya skal samskifta og samstarva við deyvaumhvørvið, so at játtanin til teknmálstulking verður brúkt á skilabesta hátt.

Sendingar, ið hava stóran samfelagsáhuga og -týdning, eitt nú valsendingar og viðkomandi dokumentarsendingar, eiga at verða tekstaðar skjótast gjørligt.

Miðað verður ímóti at veita einfaldar alnetstænastur til fólk við sjón- ella hoyribreki.

*5.2.11 Tilflytarar / integrasjón*

Kringvarp Føroya skal virka við til at framleiða upplýsandi public service-tilfar, ið vendir sær til tilflytarar, ið ikki skilja føroyskt ella skandinaviskt.

Avrit frá kvf.fo

## 6. Miðlasavnið

Í kringvarpslógini er ásett um miðlasavnið:

**§ 15.** Kringvarp Føroya hevur skyldu at goyma eintak av allari eginframleiðslu. Hetta tilfar verður goymt í miðlasavni, ið verður knýtt at Kringvarpi Føroya. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um skipan og rakstur av miðlasavninum.

*Stk. 2.* Miðlasavnið kann taka ímóti og varðveita talgilt tilfar (savnindi) frá almennum og privatum stovnum eftir reglum, sum landsstýrismaðurin ásetir.

*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur fyri varðveiting av talgildum tilfari sbrt. stk. 2 og atgeingi til hetta tilfar.

Kringvarp Føroya hevur bygt upp eitt savn, ið er ein týðandi partur av mentanararvinum, og tí skal tryggjast, at alt sent tilfar í framtíðini verður varðveitt og skrásett.

Kringvarp Føroya skal virka fyri at halda savnið á einum tryggum og dagførdum stigi.

Savn Kringvarpsins skal latast upp fyri borgaranum. Málið er, at sum mest av tí, ið er framleitt í Kringvarpi Føroya, Útvarpi Føroya og Sjónvarpi Føroya gjøgnum árini verður atkomuligt hjá borgaranum um alnetið. Fyrilit skulu havast fyri upphavsrættinum.
Verkætlanin *Savnsgull* hevur til endamáls at talgilda bandasavn Kringvarpsins og at gera tilfarið atgeingiligt fyri borgaranum. Verkætlanin skal halda fram og skal eisini umfata talgilding av eldri sjónvarpstilfari, og hetta skal verða gjørt innan fyri fíggjarkarmar stovnsins.

## 7. Fíggjartøl

Public service-sáttmálin millum Mentamálaráðið og Kringvarp Føroya tekur útgangsstøði í bygnaðinum hjá Kringvarpinum. Inntøkustøðið byggir á fíggjartølini hjá Kringvarpi Føroya í Búskaparskipan Landsins, og sáttmálin byggir á rakstrarárið 2015.

Framleiðslan ella beinleiðis útreiðslurnar hjá Kringvarpi Føroya í 2015 vórðu 33,2 mió. kr. Hetta er kostnaðurin at reka deildirnar: Aktuelt, Mentan og ein part av deildini Tøkni. Óbeinleiðis útreiðslurnar í 2015 vórðu 27 mió. kr. Hetta er kostnaðurin at reka umsitingina, hin partin av deildini Tøkni, rættindi, íløgur og rentur & avskrivingar.

Talvan vísir, hvussu útreiðslurnar í 2015 vórðu býttar út á virksemið hjá Kringvarpi Føroya.

Talvan vísir, at deildin Tøkni fevnir bæði um beinleiðis og óbeinleiðis útreiðslur. Á deildini eru fólk, ið beinleiðis hava við framleiðslu at gera, sum eitt nú fotografar og fólk, sum ikki hava nakað við framleiðslu at gera, eitt nú KT-fólk, húsavørður v.m. Men hesi fólk hjálpa ofta til við ymiskum sendingum, so óbeinleiðis útreiðslur eru ikki allar óbeinleiðis.

| **Beinleiðis og óbeinleiðis útreiðslur** | | |
|---|---|---|
| **Upphæddir í kr.** | **Beinleiðis** | **Óbeinleiðis** |
| Aktuelt | 11.012.460 | |
| Heimasíðan | 1.023.744 | |
| Mentan | 11.678.898 | |
| Tøkni | 9.509.044 | 11.588.667 |
| Fyrisiting | | 7.356.854 |
| Rættindi | | 4.005.986 |
| Íløgur | | 3.367.134 |
| Rentur og avskrivingar | | 695.478 |
| **Samanlagt** | **33.224.146** | **27.014.119** |

Avrit frá kvf.fo

## Beinleiðis útreiðslur

Beinleiðis útreiðslurnar hjá Kringvarpi Føroya eru útreiðslur, stovnurin brúkar til at gera public service-tilfar til miðlapallarnar; útvarp, sjónvarp og heimasíðu. Býtið ímillum ymsu deildirnar sæst í talvuni niðanfyri.

| Beinleiðis útreiðslur | | | |
|---|---|---|---|
| | Deild | kr. | kr. |
| 5.2.1 | Aktuelt/GMF | | 11.012.460 |
| 5.2.1.1 | Heimasíðan | | 1.023.744 |
| 5.2.2 | Mentan: | | |
| 5.2.2 | - Mentan | 6.512.463 | |
| 5.2.3 | - Átrúnaður | 682.251 | |
| 5.2.4 | - Ítróttur | 1.071.369 | |
| 5.2.5 | - Børn og Ung | 2.943.309 | |
| 5.2.6 | - Tónleikur | 469.506 | 11.678.898 |
| | Tøkni framl. | | 9.509.044 |
| | Beinleiðis útreiðslur | | **33.224.146** |
| | Óbeinleiðis útreiðslur | | 27.014.119 |
| | **Samanlagt KvF** | | **60.238.265** |

Talvan vísir, at Aktuelt, sum umfatar allar tíðindasendingar, allar aktueltsendingar og morgunsendingina í útvarpinum, brúkar 11 mió. kr. av beinleiðis útreiðslunum. Hetta svarar til ein triðing.

Mentan, sum umfatar at kalla allar aðrar sendingar, brúkar 11,6 mió. kr. av beinleiðis útreiðslunum. Hetta svarar til 35 prosent. Sum sæst í talvuni er Mentan í samsvari við public service-sáttmálan býtt sundur í øki.

Á Tøknideildini eru fleiri fólk, eitt nú fotografar og sendifólk, sum eru við í beinleiðis framleiðslu. Tøkniliga framleiðslan er 9,5 mió. kr., og tað svarar til 29%.

## Óbeinleiðis útreiðslur

Óbeinleiðis útreiðslurnar í 2015 vórðu 27 mió. kr. Hetta er kostnaðurin at reka fyrisitingina, partin av deildini Tøkni, sum ikki hevur beinleiðis við framleiðslu at gera, útreiðslur til rættindi, íløgur og rentur & avskrivingar.

Talvan niðanfyri vísir, hvussu óbeinleiðis útreiðslurnar hjá Kringvarpi Føroya eru býttar sundur á ymsu økini.

| Óbeinleiðis útreiðslur | | |
|---|---|---|
| **Upphæddir í kr.** | **kr.** | **kr.** |
| Fyrisiting, lønarpartur | 4.797.981 | |
| Vørur og tænastur | 2.558.873 | 7.356.854 |
| Tøkni, lønarpartur ikki framleiðsla | 4.715.848 | |
| KT, húsakostnaður, akfør, samskifti o.a. | 6.872.819 | 11.588.667 |
| Rættindi ísv tónleik, upplestur og sendingar | | 4.005.986 |
| Íløgur, leiga og viðlíkahald | | 3.367.134 |
| Avskrivingar, skuldarar | | 695.478 |
| Óbeinleiðis útreiðslur | | **27.014.119** |
| Beinleiðis útreiðslur | | 33.224.146 |
| **Samanlagt KvF** | | **60.238.265** |

Talvan vísir, at samanlagt eru 27 mió. kr. brúktar til óbeinleiðis útreiðslur í 2015. Talið hevur verið eitt sindur hægri fyrr, men seinnu árini hevur alt meira peningur verið brúktur til at framleiða public service-tilfar.

## Væntað framleiðsla 2017

Við árslok 2016 verður greitt, hvat úrslit fíggjarliga umleggingin samanlagt gevur Kringvarpi Føroya. Mett verður, at samlaði fíggjarkarmurin fer at hækka nakrar milliónir krónur.

Nógvar útreiðslur eru eisini fyri framman. Nýggi framleiðslubygningurin er latin uttan útgerð og møblar. Talan er um ein bygning, sum skal bera alt KT-undirstøðukervið í Kringvarpi

Avrit frá kvf.fo

Føroya, so har skal stór íløga gerast, áðrenn bygningurin kann takast í brúk. Kringvarp Føroya má eisini uppstiga tøknina til HD góðsku, og tað er eisini ein stór íløga.

Mett verður, at framleiðslan í 2017 verður á leið sama støðið sum í 2016. Talvan undir vísir roknskapartølini 2015, ásetta raksturin í fíggjarætlanini fyri 2016 og eina meting fyri 2017.

| **Public Service 2015-2017** | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | **Deild** | 2015 | 2016 | 2017 |
| 5.2.1 | Aktuelt/GMF | 11.012.460 | 11.469.253 | 11.625.106 |
| | Heimasíðan | 1.023.744 | 1.135.635 | 1.151.067 |
| 5.2.2 | Mentan | 6.512.463 | 6.778.258 | 6.870.366 |
| 5.2.3 | Átrúnaður | 682.251 | 710.096 | 719.745 |
| 5.2.4 | Ítróttur | 1.071.369 | 1.115.095 | 1.130.248 |
| 5.2.5 | Børn og Ung | 2.943.309 | 3.063.435 | 3.105.064 |
| 5.2.6 | Tónleikur | 469.506 | 488.668 | 495.308 |
| | Mentanardeild íalt | 11.678.898 | 12.155.553 | 12.320.732 |
| | Tøkni framl. | 9.509.044 | 10.178.398 | 10.316.709 |
| | Beinleiðis útreiðslur árliga | 33.224.146 | 34.938.839 | 35.413.614 |
| | Óbeinleiðis útreiðslur árliga | 27.014.119 | 29.011.161 | 29.405.386 |
| | **Samlaðar árligar útreiðslur** | **60.238.265** | **63.950.000** | **64.819.000** |

## 8. Árlig frágreiðing um virksemið sambært sáttmálanum

Fyri at røkka øllum málum í sáttmálanum skal Kringvarp Føroya útbyggja hagtalsgrundarlagið, sum kann brúkast í eftirmetingini av virkseminum. Eisini skulu brúkaratøl, nøgdsemiskanningar og góðskumeting vera partur av árligu frágreiðingini.

Stjórin í Kringvarpi Føroya skal á hvørjum ári fyri 1. apríl skriva eina frágreiðing, ið vísir í hvønn mun public service-skyldurnar, ásettar í hesum sáttmála, eru hildnar undanfarna árið. Frágreiðingin skal í høvuðsheitum fylgja uppsetingini í hesum sáttmála. Eru ásetingarnar ikki hildnar, skal stjórin gjølla greiða frá orsøkini og t.d. vísa á, hvussu ætlanin er at halda public service-skyldurnar restina av sáttmálaskeiðnum.

Frágreiðingin verður latin stýrinum fyri Kringvarp Føroya, ið hevur eftirlit við, at public service-sáttmálin verður hildin. Eftir at frágreiðingin er viðgjørd, letur stýrið í seinasta lagi 1. mai landsstýrismanninum í mentamálum frágreiðingina saman við viðmerkingum og fráboðanum um, hvørji tiltøk ætlanin er at seta í verk, um so er, at sáttmálin á týðandi økjum ikki er hildin.

Við støði í frágreiðingunum kunnu partarnir eftirmeta sáttmálan og gera neyðug ískoyti, tá ið sáttmálaskeiðið er av.

Avrit frá kvf.fo